# Fiskifrøðingarnir gera Henrik Old trillrundan

**Hann mælir til at hava altjóða ráðstevnu í Føroyum um burðardyggan fiskiskap, har føroyskir og útlendskir serfrøðingar skulu vera við**

BURÐARDYGGUR FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

– Tað er onki at siga til at vit vera trillrund av fiskifrøðingunum.

Henrik Old, formaður í vinnunevnd Løgtingsins er langt frá foreintur við tilmælini, sum føroyskir myndugleikar hava fingið frá fiskifrøðingunum um, hvussu nógv vit eiga at fiska undir Føroyum av teimum ymsu fiskasløgunum.

Hann vísir á, at tey næstu trý árini hava ICES, og aðrir fiskifrøðingar, mælt til at skerja fiskiskapin eftir toski og hýsu meiri enn ein triðing, og fiskiskapin efttir upsa nakað minni.

– Samstundis mæla teir til at skerja fiskidagatalið eini 2-3% um árið fyri at leggja upp fyri effektiviseringum í fiskiflotanum.

– Taka vit ein línubát, sum hevur 140 dagar, rýkur hann eftir tilmælinum frá ICES niður á 90 dagar, umframt nakað á Føroya Banka og kanska okkurt undir Íslandi, so í mesta lagi hevur hann fýra- fimm mánaðir, skal tilmæli frá ICES fylgjast.

– Tað sigur seg sjálvt, at ongin kann liva av at fiska í fimm mánaðir. Skal so eisini tilmælið fylgjast um at skerja fiskskapin 2-3% um árið fyri effektiviseringina í flotanum, kunnu vit nevna árið og dagin, har tann síðsti loysir frá landi. Tí eru slík tilmæli fullkomiliga veruleikafjar, sigur Henrik Old.

## Altjóða ráðstevna

Hann heldur, tað er so langt ímillum teori hjá fiskifrøðingum og praksis hjá politiska myndugleikanum og fiskivinnuni, at tað er neyðugt at taka málið upp.

– Tað er ein so stór gjógv ímillum fiskifrøðingarnar, politisku myndugleikarnar og fiskivinnuna at vit eiga at royna at skapa størri forstáilsi ímillum allar partarnar.

–Hann heldur tí, at tað er neyðugt at fáa eitt veruligt samskifti í lag við serfrøðingarnar hjá ICES.

Tað heldur hann kann gerast við at halda eina ráðstevnu í Føroyum, har serfrøðingar frá ICES skulu vera við, saman við øðrum góðum kreftum í fiskivinnuni, bæði politiskum myndugleikanum, vinnuni sjálvari, føroyskum fiskifrøðingum og annars øðrum felagsskapum, sum vara av fiskivinnuni.

Hann heldur, at ein slík ráðstevna kundi gjørt sítt til at allir partar komu at skilja hvønn annan betri, – Tað kundi hjálpt fiskifrøðingunum til at skilt vinnuna og politiska myndugleikan, so at teir framyvir hildið seg frá at geva tilmæli, um eru veruleikafjar og tað kundi hjálpt politiska myndugleikanum og vinnuni at skilt, hví fiskifrøðingarnir arbeiða, sum teir gera.

## Stýra fiskiskapinum

Men grundin til, at hann mælir til eina slíka ráðstevnu, er ikki bara veruleikafjar tilmæli frá fiskifrøðingunum, tí hann heldur avgjørt eisini. at føroyingar hava nógv gott at vísa á í strembandini eftir at stýra fiskiskapinum.

– Vit hava eina fiskidagaskipan, sum hevur verið væleydnað, men sum kortini ikki verður brúkt aðrastaðni. Men hetta er ein skipan, sum ICES næstan ikki tekur upp á tungu. Ístaðin stara teir seg blindar upp á kvotuskipanir, sum vit hava prógvað ikki kunnu brúkast til at stýra fiskiskapinum eftir botnfiski við.

– Tað er helst tí, at teir halda, at hon verjir ikki nóg væl tann einstaka stovnin. Men verður fiskiskapurin eftir einstøkum fiskasløgum ov nógvur, hava vit eisini amboð í okkara fiskidagaskipan, sum gevur landsstýrismanninum heimild at seta kunngerðir í verk, sum tálma fiskiskapinum eftir einstøkum fiskasløgum við friðingum av ymsum slagi.

– Nógv lond hava til fánýtis roynt at stýra fiskiskapinum við kvotum, men tað hevur ongastaðnmi ført til nakað uttan tann bera undirgang, sigur Henrik Old.

– Íslendingar hava kvotur og teir hava skert fiskiskapin munandi, eitt nú eftir tilmælum frá ICES og teirra egnu fiskifrøðingum, men tað hevur ikki ført til nakað, uttan undirgang.

– Meiri, teir hava táttað í við at skerja kvoturnar, minni er fiskað, men fiskastovnarnir hava ikki verið fyri framgongd fyri tað.

– Eisini hetta er ein orsøk til at hann heldur tað vera neyðugt at savna serkunnleikan úr Noregi, Íslandi, Føroyum, ICES og aðrastaðni frá til eina ráðstevnu í Føroyum at tosa um tey ymsu stýringsamboðini.

– Á hesi ráðstevnu kunnu vit vísa á, at í Føroyum hava vit eina skipan, sum hevur ført við sær, at vit hava hampuligan fiskiskap, uttan at at so stórar skerjingar, sum teir hava mælt til.

– Væl hevur gongdin í natúruni verið okkum til vildar, men síðani fiskidagaskipanin varð sett í verk, er hon skorin 18,5%, men hon hevur tryggjað okkum javnt góðan fiskiskap, men tað vilja teir fiskifrøðingar, sum geva okkum leiðbeiningar, ikki síggja, sigur Henrik Old.

# Heini yvirmetir friðingarnar

**–Formaðurin í vinnunevndini er ikki samdur við næstformanninum um, hvussu stóran týdning, økisfriðingarnar hava**

BURÐARDYGGUR FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

– Tað kann væl vera, at friðingarnar hava nakað at siga. Men tað er verri enn so alt.

Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum, er ikki samdur við Heina O. Heinesen um, hvussu stóran týdning økisfriðingarnar hava fyri fiskiskapin ( sí grein aðrastaðni í blaðnum).

Henrik Old heldur ikki, at økisfriðingarnar eru ikki gjørdar fyri at tálma fiskiskapinum.

–Økisfriðingarnar eru settar í verk fyri at býta Føroyagrunnin sundur ímillum teir ymsu veiðihættirnar, so at allir bólkar hava síni øki at fiska á, heldur enn at gera fortreð fyri hvørjum øðrum.

Friðingarnar tryggja sátt og semju á Føroyagrunninum, og gera, at tað ber til hjá fleiri at skipabólkum at fiska.

Men fyri tað um friðingarnar eru, ber væl til at fiska eina ørgrynnu av fiski, hóast tað ikki akkurát verður trolað eftir honum.

Hinvegin heldur formaðurin í vinnunevndini, at tað, sum hevur nógv størri týdning, er, at leiðirnar, har fiskurin gytur, vórðu friðarar fyrst í nítiárunum.

– Tað er tað munadyggasta tiltakið, sum nakrantíð er sett í verk fyri at tryggja fiskastovnarnar, sigur Henrik Old.

– Tað gjørdi, at fiskurin fekk frið at gýta og tað førdi so aftur við sær, at tey árini, natúran var til vildar, komu ómetaligar mongdir undan.

Hetta førdi við sær, at fiskiskapurin var tískil longu á veg uppeftir, tá ið økisfriðingarnar vórðu settar í verk í 1994, sigur Henrik Old.

Hann sigur, at hann hevur roynt nógva staðni, eitt nú í Norðsjónum, har tað ikki hevur borið til at semjast um at friða gýtingarleiðir og har gongur bara skeiva vegin.

# Friðingar hava gjørt undurverk

**– Tað eru ikki fiskidagarnir, men økisfriðingarnar, sum hava bjargað fiskastovnunum undir Føroyum, heldur Heini O. Heinesen í vinnunevndini hjá Løgtinginum**

FISKASTOVNAR
*Áki Bertholdsen*

– Tað eru ikki fiskidagarnir, sum hava bjargað fiskastovnunum undir Føroyum.

Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, er ikki samdur við prátinum um burðardygga fiskivinnu.

Hann heldur, at tá ið ICES- felagsskapurin, og onnur, tosa um burðardyga fiskivinnu, er týdningurin av fiskidøgum í hesum sambandi munandi yvirmettur.

Hann heldur nevniliga, at tað, sum hevur nógv størri týdning enn fiskidagarnir, eru tær økisfriðingin-ar, sum vóru settar í verk miðskeiðis í naístiárunum.

Sjálvur var hann formaður í Vinnunevndini, tá ið økisfriðingarnar vórðu settar í verk.

Tað leikaði hart á, at fáa økisfriðingarnar samtyktar í løgtinginum og hann sigur, at nú fiskiskapurin er so góður, høvdu tær neyvan verðið samtyktar.

– Økisfriðingarnar vórðu settar í gildið í 1994 og síðani tá hevur fiskiskapurin verið javnt góður og vit hava ongantíð áður havt so góðan og so støðugan fiskiskap í so nógv ár á rað, sum vit hava havt, síðani økisfriðingarnar vórðu settar í verk- og ídnaðarskipini vóru koyrd av grunnunum.

Hann nevmir dømi um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa.

–Tað var nakað væl at fáa av upsa í fiskaloysisárunum í fyrru helvt í nítiárunum, men hinvegin var tað at kalla eiðasørt til tosk og hýsu, tó so at siga onki var fiskað av hesum fiskasløgunum.

Men longu tvey ár eftir, at friðingarnar vórðu settar í verk, bragdaði aftur og í fiskiárinum 1996/ 1997 var fiskiskapurin eftir toski komin upp á 37.619 tons og fiskiskapurin eftir hýsu var komin upp á 11.095 tons.

Ì árunum eftir at økisfriðingarnar vórðu settar í verk, var fiskiskapurin eftir toski:

| Ár | Tons |
|---|---|
| 1996/97: | 37.619 |
| 1997/98: | 27.119 |
| 1998/99: | 19.294 |
| 1999/00: | 18.656 |
| 2000/01: | 27.097 |

## Eftir hýsu var fiskiskapurin:

| Ár | Tons |
|---|---|
| 1996/97: | 11.095 |
| 1997/98: | 19.852 |
| 1998/99: | 18.898 |
| 1999/00: | 15.317 |
| 2000/01: | 14.000 |

## Og fiskiskapurin eftir upsa var:

| Ár | Tons |
|---|---|
| 1996/97: | 15.957 |
| 1997/98: | 22.281 |
| 1998/99: | 28.201 |
| 1999/00: | 33.308 |
| 2000/01: | 37.240 |

## Og tilsamans var fiskiskapurin hesi árini:

| Ár | Tons |
|---|---|
| 1996/97: | 92.722 |
| 1997/98: | 101.694 |
| 1998/99: | 94.851 |
| 1999/00: | 96.484 |
| 2000/01: | 107.759 |

Heini O. Heinesen sigur, at hetta er fullgott prógv fyri, hvussu stóran týdning, økisfriðingarnar hava havt, tí tá ið fiskiskapurin er so javnt góður yvir eitt so langt áramál, er tað ikki tilvildarligar broytingar í natúruni, sum eru orsøkin.

– Sjálvandi gongur upp og niður í natúruni, men tølini yvir fiskiskapin hesi seinastu árini prógva, at tað eru økisfriðingarnar, sum hava størstan týdning, tá ið fiskiskapurin skal stýrast.

Samstundis er studningurin tikin burtur og tað hevur gjørt sítt til, at ongi skip verða hildin i flotanum við kunstigum andadrátti og tað hevur so aftur lagað flotan til tað tilfeingi sum er.

– Tí er tað púra greitt, at verða økisfriðingarnar ikki tiknar við, ber tað illa til at tosa um burðardyggan fiskiskap. Men enn hevur ICES bara tosað um fiskidagar í hesum sambandi og tað ger teirra útsagnir ógvuliga ivasamar, tí at gloyma økisfriðingarnar í hesum sambandi er at leypa ov lætt um veruleikan, tí tað eru tær, sum hava nógv størstan týdningin fyri at syra fiskiskapinum.

Heini O. Heinesen sigur at við i hevur hann ikki sagt, at fiskidagaskipanin ikki stýrir fiskiskapinum.

– Men veruleikin er, at fiskidagaskipanin kom í gildið í 1996 og tá var fiskiskapurin longu batnaður sum eitt úrslit av friðingunum. Fiskidagaskipanin er heldur ongin avmarking í sær sjálvum, tí teir allarflestu bólkarnir fiska so nógvar dagar, teir kunnu, uttan at brúka allar dagarnar.

Heini O. Heinesen leggur afturat, at so leingi økisfriðingarnar eru í gildi, stúrir hann ikki fyri fiskastovnunum.



Norðuratlantsbólkurin:

# Skipar fyri ráðstevnu



*Manningin í Norðuratlantsbólkinum: F.v. Tórbjørn Jacobsen, Lars-Emil Johansen og Kuupik Kleist. Tórbjørn er varamaður hjá Høgna Hoydal.*

**Nevndararbeiðið hjá Norðuratlantsbólkurin er farið ígongd, men einki er enn at frætta frá nevndararbeiðinum. Skipað verður fyri einari mini-ráðstevnu seinni í mánaðinum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Eftir fólkatingsvalið 20. november seinasta ár, gjørdu menn av at skipa seg í bólk á Fólkatingi. Talan gjørdist um tann nú so kenda Norðuratlantsbólkin. Á valinum komu tvey umboð frá sjálvstýrisvonginum í Grønlandi inn á Fólkating, og úr Føroyum kom so eitt umboð fyri Tjóðveldisflokkin. Beinanvegin vísti áhugi seg at vera fyri einum tílíkum samstarvi, og longu 5. desember varð formliga samstarvsavtalan undirskrivað.

Limirnir í bólkinum eru ikki so bundnir av samstarvinum, sum limirnir í vanligum flokkum. Teir hava eitt nú ikki bundið seg til at atkvøða í felag í fólkatingssalinum.

Yvirskipaða málið hjá bólkinum er, at Grønland og Føroyar vinna sítt fulla sjálvstýri, og á fólkatingi skulu teir tríggir limirnir standa saman um mál og viðurskifti, har Føroyar og Grønland hava felags áhugamál.

Teir báðir, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, úr ávíkavíst Siumut og Inuit Ataqatigiit manna grønlendska partin av Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi. Hitt umboð er Høgni Hoydal, sum, meðan hann er landsstýrismaður, verður avloystur av Tórbirni Jacobsen.

Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur fyri Sambandsflokkin, valdi ikki at gerast limur í bólkinum.

## Nevndararbeiði

Tá bólkurin var á kunningarferð í Føroyum í mars mánaði, greiddi bólkurin frá, at ein av ætlanum hjá bólkinum var at fara undir umfatandi kanningararbeiði av einari røð av viðurskiftum, sum viðvíkja Føroyum og Grønlandi í ríkinum.

Millum evnini, ið hesir arbeiðsbólkar skuldu umrøða var m.a. fólkarrættarliga støðan hjá føroyingum og grønlendingum. Eisini skuldi ein bólkur fara í holt við at kanna hernaðarlig viðurskifti viðvíkjandi Grønlandi og Føroyum. Arbeiðið hjá hesum bólkinum gongur tó ongan serligan veg, og lagnan hjá bólkinum er óviss í løtuni.

Sjúrður Skaale starvast hjá Norðuratlantsbólkinum, og hann er eisini skrivari hjá tí arbeiðsbólkinum, ið fæst við tað fólkarættin.

Hann upplýsir, at arbeiðið hjá »sínum« bólki er farin ígongd. Hann fegnast stórliga um liðið av serfrøðingum, ið bólkurin hevur fingið at manna nevndina.

Talan er um Lauri Hannikainen úr Finnlandi, Gudmundur Alfredsson úr Íslandi og Peter Germer úr Danmørkini. Allir eru teir víðagitnir serfrøðingar innan fólkarætt og løgfrøði.

## Syndarligt sosialt

Ein bólkur varð av Norðuratlantsbólkinum eisini settur til at hyggja nærri at sosialu støðuni hjá grønlendingum í Danmark. Hesin bólkurin er eisini farin til arbeiðis.

–Gerandisdagurin er í nógvar mátar ógvuliga tragiskur hjá nógvum grønlendingum í Danmark, sigur Sjúrður Skaale.

Norðuratlantsbólkurin hevur skipað arbeiðsbólk, sum skal fáa greiðu á, hví so nógvir grønlendingar koma illa fyri. Hesin bólkurin er bert mannaður við grønlendingum. Manningin telur grønlendskar kvinnur, ið eru væl etableraðar í danska samfelagnum.

Úr arbeiðsgrundarlagnum hjá bólkinum stendur fylgjandi at lesa:

–For en række borgere fra Grønland medfører ophold i Danmark af den ene eller anden grund en marginaliseret tilværelse, ofte forbundet med svære sociale og misbrugsmæssige problemer.

I forbindelse med disse borgeres dobbelte status som grønlandske og danske borgere, synes der at være en række uafklarede forhold omkring deres sociale, sproglige og rettighedsmæssige forhold. Der er brug for, at hjælpe disse mennesker med en afklaring af såvel deres rettigheder i forhold til rigsfællesskabet som i forhold til de internationale konventioner, der beskytter disse borgere.

## Rundferð

Í døgunum 25., 26., 27 september fer Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi á rundferð í Danmark. 25 verður vitjað í Odense, 26. í Århus og fríggjadagin hin 27. september verður vitjað í Aalborg.

Fundirnir skulu skipast í samstarvi við føroyingafeløgini og grønlendingahúsini í teimum áðurnevndu býunum. Ætlanin er, at Norðuratlantsbólkurin skal á fundi við nevndar í teimum ymsu feløgunum og at skipað verður fyri einum almennum fundi.

–Norðuratlantsbólkurin ætlar við rundferðini at leggja fram sítt grundarlag, og at greiða frá sínum arbeiði í og uttanfyri Fólkatingið. Málið er at koma í samband við føroyskar og grønlendskar útisetar, og fáa í lag eitt áhaldandi orðaskifti í Danmark um føroysk og grønlendsk mál. Bólkurin tekur sjálvsagt ímóti hugskotum um mál, sum eiga at verða tikin upp á fólkatingi, sigur Sjúrður Skaale.

Norðastu limirnir á fólkatingi ætla at leiga sær ein lítlan buss, sum skal føra teir runt í Danmørkini. Í sambandi við fundin í Aalborg hevur bólkurin í hyggju at skipa fyri einari veitslu saman við føroyinga- og grønlendingafelagnum.



*Nevndin, sum er sett at kanna fólkarættarligu viðurskiftini hjá føroyingum og grønlendingum. Frá vinstru eru menninir: Hans Jacob Helms, skrivstovuleiðari hjá Norðuratlantsbólkinum, Lauri Hannikainen, professari, Gudmundur Alfredsson, professari, Bogi Eliasen, lesandi, og Peter Germer, professari. Peter Germer verður ikki við til restina av arbeiðinum hjá nevndini*

*Mynd: Sjúrður Skaale*

*framhald av síðu 3*

Jógvan á Lakjuni:

## Saknar orðaskifti um kirkjuna



Jógvan á Lakjuni sigur, at hóast tað stendur í samgonguskjalinum, at kirkjan skal gjaldast umvegis fíggjarlógina, so saknar hann eina neyvari viðgerð og eitt orðaskifti um spurningin. Hann vísir á, at tað er av alstórum týdningi, at fólk kenna seg trygg við yvirtøkuna av kirkjuni, og tí tekur hann undir við, at landskassin í fyrstu atløgu rindar tað, sum nú verður goldið úr Danmark. Men tá kirkjan er yvirtikin, má greiða at fáast á, hvussu føroyska kirkjan skal skipast í framtíðini, hvørjar uppgávir kirkjan skal røkja, og hvør skal gjalda hvat. Hann vísir á, at spurningarnir um støðuna hjá fólkakirkjuni í samfelagnum skulu viðgerast og takast við í samband við arbeiðið at smíðja eina føroyska grundlóg.

- Hugsjónarliga, ideologiskt, haldi eg tað vera natúrligt, at fólk sum hoyra til kirkjuna, sjálvi gjalda fyri hana, sigur Jógvan á Lakjuni og leggur afturat, at hann hevur stóra virðing fyri kirkjuni, sum hann metir tíðum virka sum eina savnandi eind í samfelagnum.

Jógvan á Lakjuni vísir á, at kirkjan hevur fleiri samfelagsligar uppgávur, og í hesum sambandi eigur greiða at fáast á, hvussu nógv hesar uppgávur kosta, og eisini eigur spurningurin at reisast, hvørt hesar uppgávur eiga at verða fluttar frá kirkjuni til onkran annan at røkja. Hann metir tað vera ein sjálvsagdan lut, at samfelagsligu uppgávurnar hjá kirkjuni ikki einans verða goldnar yvir kirkjuskattin, men at øll bera kostnaðin í felag. Jógvan á Lakjuni leggur afturat, at tað ikki er vist, at samfelagsligu uppgávurnar, sum kirkjan í dag røkir, verða betri røktar onkra aðrastaðni. Tað er eisini ein spurningur, sum greiða má fáast á, metir tingmaðurin.

Jenis av Rana:

## Kirkjufólk eiga sjálvi at gjalda



Jenis av Rana sigur seg ikki duga at skilja, hví kirkjufólkið ikki sjálvt kann gjalda fyri sína kirkju. Hann vísir á, at í øllum øðrum samkomum í landinum noyðist fólkið, sum har gongur, sjálvt at gjalda allar úrtreiðslur.

- Tað eigur ikki at vera nakar trupulleiki hjá limunum í fólkakirkjuni at gjalda eitt sindur meira í kirkjuskatti til sína egnu kirkju. Bíblian tosar um at lata tíggjund, her tosa við um tað, ið svarar til undir eitt prosent av inntøkuni hjá tí einstaka liminum í fólkakirkjuni, vísir Jenis av Rana á. Hann er greiður yvir, at kirkjan í dag hevur nakrar samfelagsuppgávur, sum øll hava nyttu av, og kostnaðin av hesum skal kirkjan ikki bera einsamøll. Tingmaðurin sær tveir loysnir: antin at lata onkran annan stovn røkja almennu skyldurnar, sum kirkjan í dag røkir, ella at fólk, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, skulu gjalda eitt ávíst brúkaragjald fyri hesar tænastur.

Jenis av Rana sigur seg ikki kunna taka undir við, at hædd ikki verður tikin fyri, at øll ikki eru limir í fólkakirkjuni. Hann metir, at tað ikki er nóg væl útgreinað í samgonguskjalinum, tá tað stendur, at kirkjan skal gjaldast av lands-kassanum. Tí verður hetta fylgt, so skulu fólk uttan fyri kirkjuna bæði gjalda til sína egnu samkomu og til fólkakirkjuna, og tað kann ikki vera rætt, metir Jenis av Rana.

Eftir hansara tykki hevur Mentamálaráðið higartil verið sera klossut í sínum arbeiði at yvirtaka kirkjuna. Tingmaðurin vísir á, at tað tykist sum um partarnir innan kirkjuna als ikki eru tiknir við í arbeiði, og hann saknar eisini eitt alment kjak um, hvat skal vera av kirkjuni og hvør hennara leiklutur skal vera í framtíðini.